2 ´arin

Les í morgin



## Grenj er ein partur av lívinum

»Tað er ein partur av lívinum at grenja. Keypa vit ost, er osturin ikki kanska ikki nóg ræstur. Soleiðis eru vit. Tann, ið ikki grenjar, ger ov lítið,« heldur Amariel Norðoy, listamaður

## Eivør og dreymurin

Hon rýmdi úr fólkaskúlanum, tá hon var liðug við 9. flokk. Nú fæst hon bara við tónleik og stóri dreymurin er ein yrkisleið sum tónleikari – gjarna í útlondum



**og mangt annað**



*Fyrrapartin í gjár á útvarpsstøðini Lindin, sum heldur til í Bøkjarabrekku í Havn. Tey gjørdu klárt til fyrstu sendingarnar, sum fara í luftina í dag. Mynd: Álvur Haraldsen*

# Lindin skal sigla millum skerini

*Heitu átrúnaðarligu stríðsmálini skulu ikki takast upp á tunguna á nýggju útvarpsstøðini Lindin. Støðin skal verða fyri øll, sigur nevndarformaðurin, nú støðin í dag fer at senda fyri fyrstu ferð*

*Eyðun Klakstein*

Kegl um dóp, frelsu, fosturtøku og onnur heit átrúnaðarlig mál er útihýst av 101 MHz á FM-bandinum, har Lindin frá í dag fer at halda til.

Klokkan trý seinnapartin fer nýggjasta útvarpsstøðin í luftina, og alt tilfar, sum verður sent út til lurtararnar, er andaligt.

Men tað verður ikki tað stóra sjálvtøkuborðið hjá teimum, sum gera sendingarnar. Leiðslan, sum í løtuni er ein fýra mannað nevnd, hevur sett forboð fyri, at tey málini, sum vanliga elva til stríð millum trúarbólkar í Føroyum, skulu viðgerast á Lindini.

– Vit leggja dent á, at Lindin er fyri øll fólk og allar trúarbólkar, og tí fara vit ikki at taka upp evni, sum teir ymsu trúarbólkarnir eru ósamdir um, sigur Preben Hansen, nevndarformaður í Lindini.

– Tað eru ofta smálutir, sum kirkjur og samkomur eru ósamd um, og tí ber tað væl til at gera gott andaligt tilfar, uttan at tosa um málini, sum øll ikki eru samd um.

– Um onkur av teimum, sum ger sendingar, ikki aktar boðini, ja, so fáa tey tað at vita, at tey skulu lata verða við at viðgera evni, sum kann elva til stríð millum trúarbólkar.

### Brúka báðar bíbliutýðingarnar

Tvær føroyskar bíbliutýðingar eru, og Lindin ætlar at brúka báðar. Hvørgin av týðingunum fær einarætt í sendingunum hjá Lindini.

Í næstu viku fer Lindin at senda brøv út til allar kirkjurnar og tey 86 missiónshúsini og samkomurnar. Ætlanin er at fáa hesi at lata upplýsingar um teirra virksemi til Lindina, so andaliga útvarpsstøðin gjøgnum vikuna kann greiða frá, hvørji tiltøku eru at fara til í landinum.

Mikukvøld klokkan 21.00 verður ein sending um tað, sum fer fram kring landið innan trúarlív, men Lindin ætlar eisini at hava leypandi upplýsingar um tiltøk.

– Tað er eingin ávís samkoma, sum stendur aftanfyri Lindina. Vit eru fýra persónar, sum sita í nevndini fyri útvarpsstøðina, men vit leggja dent á, at støðin er fyri øll. Allar kirkjur og samkomur í Føroyum eru vælkomin at vera við í arbeiðnum, sigur Preben Hansen.

Lindin hevur tó einki veruligt samband havt við Jehova vitni.

### Eingi møti og ongar gudstænastur

Tey sum vænta at hoyra í ríkiligt mát av møtum og gudstænastum í Lindini, koma at bíða til fánýtis.

Lindin ætlar als ikki at senda frá møtum og gudstænastum, og tann avgerðin er tikin í tráð við politikkin um, at eingin kirkja ella samkoma skal takast fram um aðra.

– Vit vilja sleppa undan at fólk verða misnøgd við hvaðani vit senda gudstænastur ella møti, og tí fara vit als ikki undir slíkar sendingar fyrstu mánaðirnar, sigur Preben Hansen.

Tá sendarin hjá Lindini verður tendraður í dag klokkan 15.00 verður eitt sindur gjørt burturúr.

Lindin hoyrist í høvuðsstaðarumráðnum, og ymsa staðni á Skálafjørðinum verður eisini gjørligt at fáa fatur á rásini í útvarpslurtinum.

**Les eisini á síðu 9**

### Lindin

Útvarpsstøðin Lindin sendir á 101 MHz og hoyrist í høvuðsstaðarøkinum og onkrastaðni á Skálafjørðinum.

Lindin verður stýrd av eini fýra manna nevnd. Í nevndini sita Preben Hansen, sum er formaður, Jenis av Rana, Dánjal á Dul Jacobsen og Símun Hansen.

Eingin ávís samkoma ella trúðarbólkur stendur aftanfyri Lindina, og nevndin leggur dent á, at støðin er fyri øll.

Fyrstu tíðina er ætlanin at senda hvønn dag frá klokkan 13.00 til 22.00. Fríggjakvøld verður sent nakað longur, og sunnudag verður byrjað klokkan 15.00.



# Jákup er offraður

*Hetta heldur fyrrverandi landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Andreas Petersen, sum í sama viðfangi fylist á, at embætismannaverk okkara viknar, orsakað av stórum útskiftingum og ótryggleika millum stovnsleiðarar*

Jákup Mørk

Andreas Petersen, kommunulækni og fyrrverandi landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, er sannførdur um, at Jákup Mørkøre er offraður í sjúkrahússtríðnum.

### Helena gav sjálv boðini

Andreas greiðir frá, at Helena Dam á Neystabø seinasta heyst gjørdi vart við, at lønarparturin av samlaðu útreiðslunum, var nógv størri á Landssjúkrahúsinum, enn hann var á sjúkrahúsunum í Klaksvík og í Suðuroy. Samstundis gjørdi hon vart við, at størri rúmd átti at verið fyri umvælingum og íløgum á Landssjúkrahúsinum, tí hesin parturin hevði verið við skerdan lut í fleiri ár.

- Longu tá sendi Helena út signal um, at lønarskerjingar skuldu fremjast á Landssjúkrahúsunum, sigur fyrrverandi landsstýrismaðurin. Hann ivast heldur ikki í, at Jákup Mørkøre hevur handlað út frá hesum, og tískil hevur nýtt størri part av játtanini til viðlíkahald og íløgur, soleiðis at signalini frá landsstýriskvinnuni vórðu fylgd.

At landsstýriskvinnan ikki skal vera kunnað um, hvørjar avleiðingar hetta skuldi fáa fyri sjúkrahúsverkið skilji eg als ikki, sigur ein avgjørdur Andreas við Sosialin.

Fíggjarætlaninar fyri ymsu stovnarnar verða lagdar um summarið og tíðliga á heysti, og hóast landsstýriskvinnan sjálvandi ikki kennir einstøku tølini niður í smálutir, so átti hon at verið vitandi um, hvørji høvuðstølini í ætlanunum vóru. Eru eitt nú lønarútreiðslurnar minkaðar lutfalsliga, átti ikki at verið trupult at ímynda sær, hvørjar avleiðingar hetta hevði við sær.

Andreas Petersen sigur víðari, at hann hvørki skilur ella trýr, at at einki samskifti hevur verið umvegis stjóran í Almanna- og heilsustýrinum, og er hann tí fullvísur um, at landsstýriskvinnan hevur vitað meira, enn hon letst at vita.

### Óheppin gongd

Annars metir fyrrverandi landsstýrismaðurin, at tað er ein óheppin gongd, at stovnsleiðarar hjá tí almenna ferð eftir ferð verða offraðir, so hvørt sum tað hóvar einum landsstýrismanni. Støðan kann eisini sammetast við tað, sum hendi, tá fyrrverandi Landsverkfrøðingurin varð uppsagdur, tí avvarandi landsstýrismaður hevði fingið eitt hugskot um eina samanleggin av stovnum, uttan at nakað fyrireikandi arbeiði varð gjørt. Ikki fyrr enn eftir uppsøgnina, varð farið í holt við at kannað, hvørjar fyrimunir ein slík samanlegging fór at hava við sær, og sum kunnugt er einki komið burtur úr, uttan at landsverkfrøðingurin, í hesum føri hægsti tekniski embætismaðurin í landinum, varð koyrdur til hús og landsverkfrøðingsstovnurin niðurprioriteraður. Hetta metir Andreas vera alt annað at styrkjandi fyri demokratisku siðvenjuna her á landi.

- Embætisfólki er í stóran mun við til at tryggja stabilitetin í einum samfelag, við tað at hesir persónar gjarna verða sitandi í longri áramál, meðan politikkarar sum kunnugt koma og fara, og hetta er jú ein sunnur partur av demokratinum.

Embætismannaverkið er ein arvur, sum demokratiið hevur fingið frá einaveldisskipanini, og júst sterka embætismannaverkið hevur tryggja, at vit í Norðureuropa og Norðuramerika hava havt sera stabil politisk viðurskifti, har svik og korruptión hevur hoyrt til undantøkini heldur enn regluna, sigur Andreas Petersen.

Hann samanber síðani støðuna á okkara leiðum, við leiðsluháttin, sum er galdandi í Suðureuropa og tria heiminum. Har eru politisku viðurskiftini aloftast sera óstabil, og kemst hetta í stóran mun av, at embætismannaverkið er veikt.

- Tá embætismenninir verða skiftir út við stuttum skotbráðum, er vandi fyri, at hesir royna at skava sum mest til sín sjálvs, meðan teir sita í sessum sínum, og verður hetta aloftast gjørt uttan at hugsa alt ov nógv um moral og etikk.

- Her heima hava vit altíð havt embætisfólk, sum hava verið nøkunlunda trygg í sessi sínum, eins og tey hava fingið eina hampuliga løn, og hevur hetta tryggjað javnvágina í samfelagnum. Talan er sostatt um eina sera óhepna snaring, sum gongdin hesum viðvíkjandi hevur fingið seinastu árini, sigur Andreas Petersen at enda.



*Andreas Petersen, fyrrverandi landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum*

## Viðmerking:

# Viðmerking til játtanina til Suðuroyar Sjúkrahús

Nú í fleiri ár hava starvsfólk okkara í heilsuverkinum í fleiri ár á rað fingið eina »jólagávu« frá heilsumálastýrinum, sum er ein hóttan um uppsøgn av einum hópi av starvsfólki á teimum trimum sjúkrahúsunum.

Helst var tað bæði rætt og neyðugt at spara og skerja á hesum øki, tá kreppan leikaði harðast á, men harfrá og til uttan fyrilit at fáa hetta til ein vana á hvørjum ári, kann als ikki góðtakast, serliga nú so stórt avlop er í landskassanum, har t.d. blokkurin partvís verður brúktur til at rinda rentur og avdráttir av uttanlandaskuldini við, meðan restin av honum verður sett inn á bók, tá er hetta ov langt at fara.

Suðuroyar Sjúkrahús hevur altíð fyrimyndarliga hildið seg innan fyri játtanina, eisini tá skerjingar hava verið. Hesaferð fekk SS hækkað játtanina, men hóast tað væntaðu smáar 2 mill. í, vegna lønarhækkingar o.a. Sjúkrahúsið koyrdi longu frammanundan við lægsta blussi.

Fyri nøkrum vikum síðani vóru flestu politisku feløgini í oynni á fundi saman við okkara fólkavaldu politikarunum. Fundurin var sera góður. Semja var um at lata partapolitikk hvíla, og í staðin í felag royna at koma við uppskotum um hvussu teir trupulleikar sum Suðuroyggin hevur at stríðast við kundu loysast - eisini varð kunnað um peningatrotið hjá SS, og væntaðu vit at hetta mál tí var í góðum hondum og fór at fáa eina seriøsa viðferð av okkara fólkavaldu monnum.

Tí var tað ógvuliga hugstoytt at frætta, at uppskotið um eykajáttan til SS fall á tingi við einum braki, meðan onnur mál, sum ikki høvdu líka stóran týdning, sum hetta, sluppu spælandi ígjøgnum.

Tað var tí uppaftur meira hugstoytt at síggja hvussu okkara politikkarar spæla sær við hesum máli, og hava grivið seg niður í skotgravir og leggja eftir hvørjum øðrum í fjølmiðlunum. Vit halda okkum tí hava rætt at krevja av tykkum, at tit nú taka tykkum saman, og royna at fáa hetta álvarsmál loyst sum skjótast, einaferð med alla. Hetta er mannalagnur, sum standa uppá spæl, bæði hvat viðvíkur sjúklingum og starvsfólki.

**Við Tjóðveldiskvøðu**
**Suðuroyar**
**Tjóðveldisfelag**
**Kai Vágfjall, fm.**

Hotel Föroyar
Tlf. 317500
Hotellið við útsýninum

FLAMBERINGSKVØLD Á HOTEL FÖROYUM

fríggjakvøldið 21. jan. og leygarkvøldið 22. jan.

TIL MATNA
- Flamberað havtaska í pernod v/smáttskornum urtum
- Piparbúffur við salat buffet og bakaðum epli
- Bananasplitt

Kostnaður kr. 198.-



Dinnertónleikur við Sámal Petersen og Jóhannus Andreasen

Borðbílegging á tel. 317500

Eisini fæst bílig gisting

Altíð vælkomin á Hotel Föroyar
Best Western
Tlf. 317500

Sosialurin - 311820